# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Vit hava royndar spælarar, sum kunnu taka ábyrgd, og vit hava fleiri ungar spælarar, sum veruliga hava ment seg*

*Janus Einar Sørensen, Kyndil*

Mjølnir-ÍF 0-3 (11-25, 15-25, 25-27):

# ÍF á meistarakós

**ÍF hevur mest sum tryggjað sær meistaraheitið í meistaradeildini hjá monnum, eftir at teir vunnu ein sannførandi sigur á Mjølni í toppdystinum í KÍ-høllini sunnudagin**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri viku síðani var eingin slingur í valsinum hjá Mjølni, tá teir hólvaðu ÍF av í steypafinaluni í mansflogbólti. Mjølnir vann ein sannførandi 3-0 sigur tann dystin, og ivi stóðst ongantíð um úrslitið.

Sunnudagin var enn ein sera týdningarmikil dystur á skránni ímillum hesi bæði liðini, tá meistaraheitið mest sum kundi avgerast. Kanska ikki í ástøðini, men júst ÍF og Mjølnir hava verið somikið góð hetta kappingarárið, at ikki er væntandi, at nakað av hesum liðunum fer at missa stig ímóti øðrum liðum í síðstu dystunum.

### ÍF fekk flúgvandi byrjan

ÍF hevði valt at gera onkra broyting í dystinum í Klaksvík í mun til steypafinaluna. Teir høvdu sett Bartal Eliasen at heva, meðan Hanus Eliasen var komin inn á kantin á plássið, sum Bartal vanliga hevur røkt. Um tað var hetta, sum gjørdi mun fyri ÍF, skal her vera ósagt, men eitt er sikkurt, ÍF fekk eina einki minni enn flúgvandi byrjan uppá dystin.

Í fyrsta setti lótu teir slett ikki Mjølnir fáa fótin fyri seg. ÍF setti seg nevniliga á dystin alt fyri eitt, og sum settið leið, gjørdist munurin bara størri og størri millum feløgini. So nógv betri, sum Mjølnir var í steypafinaluni, so nógv betri var ÍF í byrjanini av hesum dystinum.

So við og við gjørdist greitt, at ÍF fór at vinna stórsigur í fyrsta setti, og úrslitið gjørdist eisini 25-11 til gestirnar úr Fuglafirði.




*Fuglfirðingar vóru eins flúgvandi í Klaksvík, sum Mjølnir var tað í steypafinaluni, og so vendi 3-0 sigurin øvuta vegin. Eitt úrslit, ið mest sum við vissu flytur FM-gullið til Fuglafjarðar*

*Mynd: Norðlýsið*

Ein skuldi trúð, at stórtapið í fyrsta settið skuldi sett eitt sindur av lívi í leikararnar hjá Mjølni, men so var ikki. Eftir trygga sigurin í fyrsta setti vóru fuglfirðingarnir eins uppsettir í næsta setti. Teir koyrdu á við somu ferð og kraft, sum teir vístu í fyrsta setti, og enn einaferð hevði Mjølnir stórar trupulleikar at fylgja við. Alt vísti seg at rigga hjá ÍF henda dagin. Teir løgdu stórt trýst á Mjølnri í servunum, og leikararnir tóktust vera nógv meir klárir til henda dystin, enn teir vóru til steypafinaluna.

Sum annað sett leið, gjørdist eisini greitt, at ÍF eisini fór at vinna hetta settið. Munurin millum liðini var enn einaferð sera stórur at kalla allan vegin, og at enda vann ÍF enn ein knúsandi 25-15 sigur, og so høvdu fuglfirðingar lagt seg á odda 2-0, og nú var kósin sett ímóti meistaraheitinum.

### Mjølnir royndi at spæla við

Byrjanin uppá dystin kundi ikki sigast at vera annað enn katastrofal fyri leikararnar hjá Mjølni, og ta teir komu inn á vøllin til triðja sett, tóktust teir endiliga vera greiðir yvir, at hetta var dysturin um meistaraheitið. Nú vóru teir nevniliga nógv betri við, og endiliga fingu áskoðararnir í KÍ-høllini eitt sindur av spenningi.

Liðini fylgdust væl í hesum settinum, og at kalla eingin munur var á liðunum. Móti endanum av settinum gjørdist greitt, at hetta triðja settið fór at blíva ein sannur gysari. Leikararnir hjá Mjølnir kempaðu rættiliga fyri at halda fast í vónini at vinna dystin, men hetta var bara dagurin hjá ÍF.

Síðstu løtuna av dystinum megnaðu fuglfirðingarnir nevniliga at halda høvdið meir kalt enn leikararnir hjá Mjølni, og so vunnu teir eisini hetta settið 27-25, og harvið vunnu teir toppdystin 3-0.

Enn kann ÍF ikki endaliga rópa seg fyri føroyameistarar, men alt bendir á, at meistaraheitið endar í Fuglafirði. Tveir dystir eru eftir at leika, og ÍF er trý stig frammanfyri Mjølnir á øðrum plássi, so illa skal gangast hjá fuglfirðingum, um teir ikki skulu vinna meistaraheitið í ár.

## Holst skoraði og fór á flog




Christian Lamhauge Holst spældi bert ein hálvleik við Lyngby, tá liðið spældi venjingardyst leygardagin. Dysturin var ímóti Køge, har Henrik Larsen er venjari. Holst legði Lyngby á odda 1-0 í fyrra hálvleiki, og so varð hann skiftur út, so hann kundi skunda sær til flogvøllin í Kastrup, har hann skuldi ferðast saman við føroyska fótbóltslandsliðnum, sum verður á venjingarlegu í Spania næstu vikuna. Lyngby vann dystin 2-1.

## Uppflytararnir vunnu á NSÍ

Tað hevur gingið eitt sindur misjavnt í venjingardystunum hjá NSÍ í ár. Um vikuskiftið vitjaði NSÍ á Argjum, har uppflytararnir úr AB tóku ímóti. Úrslitið av dystinum gjørdist 3-1 til AB. Í hálvleikinum var støðan 3-0 til AB. Málini hjá AB skutu Hendrik Rubeksen, Rógvi Holm og Súni Fríði Barbá. Troystarmálið hjá NSÍ stóð Einar Hansen fyri.

# Nýggjur dani á føroyska fótbóltslandsliðið

**Eftir avboð frá heimligum spælarum tók Jógvan Martin Olsen ð tveir nýggjar spælarar út til venjingarleguna í Spania. Annar spælarin hevur ongantíð verið á landsliðnum fyrr**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Christian Lamhauge Holst hevur spælt tveir landsdystir fyri Føroyar, og eftir sera góð avrik í Danmark seinastu tvey árini er tað ikki so løgið, at hann nú er aftur á føroyska fótbóltslandsliðnum. Christian Holst er tikin út til venjingarleguna í Spania, eftir at Bergur Midjord noyddist at geva avboð vegna skaða.

Herbert í Lon Jacobsen hevur eisini givið avboð, og í hansara stað hevur Jógvan Martin Olsen tikið ein spælara hjá Fremad Amager út. Tað er Tem Hansen, sum ongantíð áður hevur við á landsliðnum.

Tem Hansen er 23 ára gamal og hevur føroysk ættarbond, hóast hann er uppvaksin í Danmark. Hann er miðvallarspælari og hevur áður umboðað feløgini B93, Køge og Brøndby.